Sjúkrahússtjórin:

# Vit fegnast

**Poul Gert Hansen, sjúkrahússtjóri, sigur, at tað er í lagi at nýta fútarættin, tá ein starvsbólkur ólógliga ætlar at trýsta sín vilja ígjøgnum hjá leiðsluni. – Nú er staðfest, at vit hava leiðslurættin, og tað er gott, sigur hann**

FØÐIDEILDIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Nú kunnu barnakonur í høvuðsstaðarøkinum aftur draga andan róliga. Stríðið um føðideildina er í fyrstu syftu av, og við fútarættinum er staðfest, at einki verkfall verður í hesum umfari*

– Vit eru sjálvsagt ógvuliga glað fyri, at tað ikki bleiv verkfall. Serliga vegna tey sjúku, sum vit hava undir hond. Og vit fegnast um, at tað somuleiðis er staðfest, at vit hava leiðslurættin á sjúkrahúsinum. Tað var týdningarmikið fyri okkum, sigur Poul Gert Hansen, stjóri á sjúkrahúsinum

### Ongar samráðingar

Hann sigur, at føðideildin nú verður skipað sum ætlað.

– Vit fara at skipa deildina soleiðis, sum vit allatíðina hava ætlað. Tað verður gjørt saman við teimum starvsbólkunum, sum arbeiða har. Vit ætla at geva teimum ávirkan, og tað hevur eisini allatíðina verið meiningin, sigur sjúkrahússtjórin.

Men hann slær fast, at broytingarnar ikki eru nakað, sum samráðingar verða um.

– Eg eri vorðin ákærdur fyri ikki at lata upp fyri samráðingarmøguleikum, men tað er tí, at hetta er ikki eitt mál at samráðast um. Tað hevur ongantíð verið ætlanin, at hetta skuldi vera ein samráðingarspurningur, slær Poul Gert Hansen fast.

Hann vísir á, at tað eru 23 starvsbólkar á landssjúkrahúsinum og at tað verður vónleyst at skula samráðast við allar bólkarnar, hvørjaferð broytingar verða gjørdar.

Vit eru sett sum leiðsla, júst til at taka slíkar avgerðir, sigur hann.

Spurdur hvat fólk nú kunnu vænta sær fer at henda á sjúkrahúsinum, svarar hann, at hann vónar, at tað nú verður friður.

### Ólógligar snildir

Poul Gert Hansen sigur, at hann harmast um at tað var neyðugt at fara til fútarættin við málinum, men leiðslan metti ikki, at tað var nakar annar møguleiki, tí málið var komið so langt.

– Okkurt má gerast, tá ein starvsbólkur hóttir við at fara í ólógligt verkfall, fyri at trýsta leiðsluna at broyta tiknar avgerðir. Tá kann man vera noyddur til at fara til fútarættin, sigur Poul Gert Hansen.

Hann sigur, at í hesum føri var verkfallið eitt ólógligt amboð, sum starvsbólkarnir ætlaðu at nýta, fyri at trýsta leiðsluna at samráðast um nakað, sum ikki er eitt samráðingarmál

– Eg kann eisini venda tí við, og siga, at tað var gott at vit fingu eina skjóta og greiða avgerð í fútarættinum. Vit kunnu jú ikki góðtaka at starvsbólkar ólógliga trýsta sín vilja ígjøgnum, slær Poul Gert Hansen fast.

Spurdur um hvussu lagið er á sjúkrahúsinum í dag, svarar hann, at øll tykjast lættað um, at einki verkfall varð.

– Eg havi verið runt á sjúkrahúsinum í morgun og tosað við ymsu starvsbólkarnar. Øll tykjast glað og lættað, nú einki verkfall varð hóast alt. Eisini sjúkrarøktarfrøðingarnir, sigur hann.

Hann vónar, at tey nú kunnu líta frameftir og leggja stríðið eftir seg.

# Verkfallið avlýst!

**Fimm minuttir yvir miðnátt fríggjanáttina vóru fylgjandi boð løgd út á heima-síðuna hjá sjúkrarøktarfrøðingunum:**

Verkfallið, ið varð lýst at verða 6. mei kl. 8. verður hervið avlýst vegna fútaforboð.

Heitt verður á Álitisfólk felagsins at boða limunum frá hesum.



*Jana H. Dalsgaard er hørm um, at fútarætturin skuldi dragast upp í málið. – Landssjúkrahúsið hevur ikki latið upp fyri samráðingarmøguleikum, sigur hon*

### Harmiligt

Beint eftir, at niðrstøðan var kunngjørd úr fútarættinum, segði Jana H. Dalsgaard við portalin, at sjúkrarøktarfrøðingarnir harmast um, at fútarætturin skal vera mátin at loysa ósemjur.

– Enn hava vit bara fingið úrskurðin munnligt, og vit hava onga viðmerking fyrr enn vit hava fingið hann skrivligt fríggjadagin kl 13. Men vit virða avgerðina, og verkfallið er avlýst, segði Jana H. Dalsgaard.

Hon staðfesti tó, at sjúkrarøktarfrøðingarnir harmast, at tað ikki ber til at loysa konfliktir á annan hátt enn gjøgnum fútarættin. Hon metir ikki, at Landssjúkrahúsið á nakran hátt hevur latið upp fyri samráðingarmøguleikum.

– Og tað halda vit vera sera harmiligt, segði hon við portalin hóskvøldið.

Sjúrður Norðbúð, formaður í Psykiatrifelag Føroya:

# – Hetta er ein prinsippsak

FØÐIDEILDIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



– Orsøkin til, at vit hava valt at stuðla er útilukkandi tí, at fútarætturin verður blandaður upp í málið. Tað halda vit vera skeivt, staðfestir formaðurin í psykiatrifelag Føroya.

Hann sigur, at hann onga viðmerking hevur til verkfallið, um tað er ólógligt ella ikki, men hann heldur, at óansæð hvat, so eigur fútarætturin ikki at verða drigin inn í málið.

– Hatta er eitt mál, sum partarnir eiga at loysa sínamillum, við at tosa saman og samráðast. Hóast sjúkrarøktarfrøðingarnir hava hótt við ólógligum verkfallið, so hevur málið einki at gera í fútarættinum. Tað átti at verið tikið upp í gerðarrættinum, heldur Sjúrður Norðbúð.

Hann heldur, at hetta er ein prinsippsak, og at tað er prinsippinum í málinum, sum psykiatrifelagið stuðlar.

### Einasta felag úr sjúkrarøktini

Spurdur um hví psykiatrifelagið man vera einasta felag innan sjúkrahúsverkið sum stuðlar sjúkrarøktarfrøðingunum, svarar Sjúrður Norðbúð, at tað veit hann ikki.

– Eg havi ikki tosað við hini feløgini enn. Men sjúkrarøktarfrøðingarnir ringdu til okkara og spurdu, um vit ikki hildu tað vera ov galið, at fútarætturin er blandaður uppí málið. Og tað hildu vit avgjørt at tað var. Tí skrivaðu vit undir, sigur Sjúrður Norðbúð at enda.

## Yvirlýsing

Undirritaðu yrkisfeløg mótmæla harðliga, at Føroya Lansstýri nýtir fútarættin sum arbeiðsrættarligt amboð mótvegis yrkisfeløgunum í sambandi við ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, serliga við teirri sannroynd í huga, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er í ferð við at finna eina loysn á spurninginum um ósemjur á arbeiðsmarknaðinum.

Kravt verður av Føroya Landsstýri um straks at taka áheitanina um fútabann aftur og bjóða felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingum til tingingar og semjing.

Føroya Abeiðarafelag
Havnar Arbeiðsmannafelag
Starvsmannafelagið
Føroya Pædagogfelag
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag
Føroya Skipara– og Navigatørfelag
Havnar Handverkarafelag
Føroya Psykiatrifelag
Føroya Postfelag
Maskinmeistarafelagið
Føroya Fiskimannafelag
HAvnar Arbeiðskvinnufelag
Yrkisfelag studenta– og HF lærara
Føroya Lærarafelag
Magistarafelag Føroya

***Lesið meira um úrskurðin hjá Fútarættinum á síðu 8***